# Fíggjarlógin samtykt við 1. viðgerð



Á býráðsfundi hjá órshavnar kommunu í gjárkvøldið var bert eittans mál fyri, og tað var fyrsta viðgerð at fíggjarætlanini fyri 2010. Ætlanin vísir eitt avlop á 118 milliónir krónur við einum íløgukarmi á 167,5 milliónir krónur. Rakstrarútreiðslurnar eru settar til 514.589 milliónir og inntøkurnar til 633.403 milliónir krónur. Fíggjartørvurin verður sostatt 48.759 milliónir krónur, sum er samlaða hallið á fíggjarætlanini fyri 2010. Íløgurnar verða í mesta mun nýttar innan kontoina »Útbúgving og granskan«, sum fer avstað við 99,5 milliónum krónum. Kontoin »Kommunal virkir« fær 30,2 milliónir meðan »Almanna- og heilsumál« fær 23 milliónir krónur. Enn er eingin støða tikin til, hvussu undirskotið á knappar 50 milliónir verður fíggjað.



# Gudmund Mortensen 50 ár

Í dag verður ein kendur tvøroyramaður, Gudmund Mortensen, 50 ár. Tað kann sigast, at bæði fornavn og eftirnavn andar av søgu.

Eftirnavnið vísir til eina ta týdningarmestu vinnulívsætt, sum hevur verið í Føroyum. N. J. Mortensen er ein tann elsta vinnulívsfyritøkan í Føroyum, og til tíðir hevur hon eisini ein tann størsta.

Fyritøkan er annars umrødd í seinastu Miðviku í samrøðu við Gerdu Einarsson. Her gevur hon eina ja-liga lýsing av Mortensenmonnunum

Gudmund er sonur Hansinu, f. Nolsøe úr Trongisvági, og Niels Juel Mortensen. Tað kann nevnast, at Hansina og mamma hennara vóru við Tjaldrinum, tá tað rendi á Mjóvanes og sakk í 1946.

Niels Juel leiddi ættarfyritøkuna í mong ár. Honum hevði eg í síni tíð nógv við at gera, og hann var eisini ein persónligheit.

Pápi Niels Juel kallaðist eisini Gudmund. Abbi hansara var eisini ein Gudmund, sum var sonur Jón Gudmundssen Effersøe, sum var tann fyrsti Effersøe í Føroyum. Pápi hansara hevur tískil eisini verið ein Gudmund.

So her kundi verið ættarsøga við lít, men tað kann bíða til eina aðra ferð.

Niels Juel og Hansina fingu tvey børn, Desiree og Gudmund. Tað mundi liggja í kortunum, at Gudmund skuldi taka við eftir pápan.

Hann fekk so eina útbúgving og arbeiðsroyndir eftir hesum. Tað gjørdist vist skjótari enn væntað, at boð vóru eftir Gudmundi, tí Niels Juel var ikki gamal, tá hann nokk so knapliga andaðist.

Hetta gjørdi Gudmund so. Sum við øllum í fiskivinnuni hevur tað gingist upp og niður. Men her hevur Gudmund duga at laga seg til umstøðurnar og at framt ta endurnýgging, sum gagnar fyritøkuni. Gudmund hevur orð fyri at vera virkin og arbeiðssamur. Men eyðkent fyri Mortensenmenninar loypir hann ikki framav. Tí hevur fyritøkan eisini yvirlivað so leingi.

Í dag eru tvey skip í fyritøkuni Nim og Drelnes umframt ymiskt virksemi á landi.

Gudmund tók eisini við eftir pápan sum nevndarlimur í reiðarafelagnum, og her hava vit havt nógv saman. Eyðkenni fyri Gudmund er eins og hjá pápanum, at hann er sáttligur og hóvligur, og hann er ein sum heldur vil hava semju enn stríð. Tá kemur vanliga okkurt burtur úr.

Framvegis krossast okkara vegir, og tá er tað hugaligt at fáa eitt prát um aktuellu støðuna og eisinu um farnar dagar. Gudmund fær eisini tað ummæli frá teimum sum kenna familjuna, at hann er trúfastur.

Gudmund er giftur við Súsannu, ættað úr Skopun. Men seinast vit hittust, funnu vit fram til, at vit hava felags røtur í Norðragøtu. Tey bæði eiga tríggjar døtur.

Ynskt verður tillukku við føðingardegnum.

ó

# Føroyskar bókmentir á breddan



**Bókaprát, upplestur og barnabókatiltak er nakað av tí, sum verður á skránni ár árliga bókadegnum sunnudagin**

**BÓKADAGUR**
*Tíðindaskriv*

Aftur í ár skipar Rithøvundafelagið fyri Bókadegi í Norðurlandahúsinum, har ljós verður varpað á nýggjastu føroysku bókmentirnar.

Skráin í ár er sera fjølbroytt við millum annað upplestri, barnabókatiltaki og pallprátum um ymisk bókmentalig evni.

Eitt nú fer Súni Merkistein at práta við Onnu V. Ellingsgaard, journalist á Sosialinum, um at skriva um bókmentir og aðra mentan í føroysk bløð. Eisini fer hann at práta við Jóanes Nielsen um sjónleikagerð í Føroyum og yvirhøvur, og at enda er ein samrøða við Oddfríð M. Rasmussen um munin millum at skriva fyri vaksin og at skriva fyri børn og ung.

Norski umsetarin Lars Moa fer at siga nøkur orð um týðingararbeiði hjá sær og eitt sindur um útbreiðslu av týddum føroyskum bókum í Noreg.

Nicolina Beder fer at siga frá um søguna um føroysku ullina í sambandi við nýggju bók sína.

Nýggir tekstir hjá fleiri føroyskum høvundum fara at vera lisnir upp, í flestu førum lesa høvundarnir sjálvir.

Á barnatiltakinum verða nýggir tekstir hjá fimm høvundum lisnir, eisini her lesa flestu høvundarnir sjálvir. Janus á Húsagarði fer at siga frá um at myndprýða barnabøkur.

Tiltakið er skipað sum ein hugnalig felagsstund um bøkur, har møguleiki eisini er at fáa sær eitt hungaligt prát og keypa gløgg í Borðkrókinum. Rit & Rák er við á tiltakinum við øllum teimum nýggjastu bókunum og nógvir av høvundunum verða har og kunnu signera, um áhugi skuldi verið til tess.

Tað er Rithøvundafelagið, ið skipar fyri árliga Bókadegnum, sum verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin 15. november klokkan 15.